


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Verjulóg frá 1922



NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Tað var áhugavert og rørandi at lesa samrøðuna, sum Dorit Hansen hevði við Dianu í Puntabyrgi í Sosialinum 10.desember á altjóða mannarættindadegnum. Tað var veruliga hugstoytt at lesa, at myndugleikarnir í Føroyum ikka hava sæð stóra týdningin at broyta gomlu verjulógina frá 1922, sum inniber eina menniskjafatan, sum ikki hóskar til dagsins samfelag.

Eg veit,at tað tekur tíð at gera nýggjar lógir, tað hava vit livað við innan flest øki, og eru tað enn nógvar lógir í Føroyum, sum eru ótíðarhóskandi og sum ikki passa til okkara samfelag.

Eitt samfelag sum Føroyar kann ikki liva við, at hava eina avoldaða lóg, har fólk ikki eru nóg væl vard og har rættartrygdin kann verða sett í vanda.

Hetta mál mugu komandi politikarar loysa, so fólk við menningartarni kunnu tryggjast rættindi.

Hetta er ein samfelagsbólkur, sum ikki rópar hart upp um síni samfelagsrættindi.

Í okkaru demokratisku stýrisskipan eiga øll at vera vard, sæð og hoyrd.

Verði eg ein av komandi løgtingskvinnum, vil eg arbeiða fyri hesum máli.

# Tryggan ungdóm



EDVA JACOBSEN
Sambandsflokkurin

Vit í Sambandsflokkinum vilja áhaldandi arbeiða fyri at tit ungu hav eina trygga framtíð við møguleikum, sum eru á jøvnum føti við hini Norðurlondini.

Her verður millum annað hugsa um:

*Úbúgingar í Danmark*
*Útbúgvingar í øðrum londum*
*Lestrarstuðul/ íbúðarstuðul til lesandi*
*Stuðul til ungar barnafamiliur í lestrarørindum í DK*

Hesin møguleiki er best tryggjaður í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum heldur fast við hendan felagsskap og vil menna og áhaldandi nútímansgera hann.

Vel tryggleikan, vel Sambandsflokkin.

# Øll skulu hava orsøk at vera nøgd



HEÐIN MORTENSEN
valevni Javnaðarflokksins

Herfyri vísti ein kanning, at níggju av hvørjum 10 sjúklingum á føroysku sjúkrahúsunum eru nøgdir við sjúkrahúsverkið. Talan var um 89 prosent av 540 spurdum sjúklingum, sum høvdu verið innlagdir, og tað er eitt hægri prosenttal av nøgdum sjúklingum enn til dømis í Danmark.

Men samstundis siga hesi tøl eisini, at ein av hvørjum 10 sjúklingum er ikki nøgdur, ella 11 prosent. Og tað er sjálvandi ikki so gott, tí umráðandi er jú, at fólk við ørindum í sjúkrahúsverkinum kenna seg væl har og fáa alla ta hjálp, teimum tørvar.

Hví 11 prosent ikki eru nøgd, kunnu sjálvandi nógvar orsøkir vera til, men frá politiskari síðu ræður um at gera alt, ið gerast kann, so næsta kanning kemur so nær 100 prosents nøgdsemi, sum gjørligt. Hetta kann gerast upp á nógvar mátar.

Ein er við viðgerðartrygd, so allir sjúklingar innan tvær til seks vikur kunnu vera vísir í at fáa ta hjálp, teir hava fyri neyðini. Ein annar máti er at styrkja um fakliga førleikan hjá starvsfólkunum við skeiðs- og eftirútbúgvingartilboðum, so tey eru før fyri at taka við teimum avbjóðingum, ið koma.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at tað er trygt og gott hjá bæði sjúklingum, starvsfólkum og øðrum, ið hava nakað við sjúkrahúsverkið at gera. Eingin leitar sær hjálp har, sum ikki hevur brúk fyri tí, so tí eigur alt at verða gjørt fyri, at allir sjúklingar hava orsøk til at vera nøgdir við ta hjálp, teir fáa har.

Skal hetta eydnast, er eisini neyðugt við bestu umstøðum til starvsfólkini, sum fyri stóran part eru ovbyrjað, tí ov mikið er at gera innan sjúkrahúsverkið. Her eiga átøk at verða gjørd, so starvsfólkini kunnu mennast, umframt at tænastur verða samskipaðar, so arbeiðsbyrðan verður lættari at bera, samstundis sum tað eisini vil lætta um hjá sjúklingunum.

www.hedinmortensen.com

# Eg hoyri teg – Heðin D.



POUL MICHELSEN
Fólkaflokkurin

"Tað er væl kent, at virkiseigarar senda rokningina fyri egið valstríð víðari til egði virkið at gjalda." Hesi vóru orðini hjá tær Heðin D.

Við øðrum orðum : Tá ein virkiseigari manglar pengar ja, so ferð hann bara í kassan og tekur sær tað, sum hann hevur brúk fyri.

Um Heðin D. Poulsen ikki heldur, at hetta eru sera álvarsligar ákærur ímóti virkiseigarum, sum ditta sær at stilla upp í politikki, so gevi eg lítið fyri løgfrøðisprógvið hjá Heðini.

Um Annita og Heðin D. ynsktu gjøgnumskygni, so haldi eg at tað var tað, tey skuldu hildið seg til og ikki brúkt høvi til at ákæra virkiseigarar fyri óreglusemið. Tí tað var tað, tey gjørdu.

Síggi, at Heðin D. í Dimmu ídag roynir at flyta fokus – tað skilji eg væl.

Fyri mær er málið rættuliga prinsipielt. Eg eri tí rættuliga fortørnaður yvir, at Annita og Heðin, hjálpt av útvarpinum, sleppa at leypa út í orð, at virkiseigarar sleppa sær undan at gjalda fyri egið valstríð, við at senda rokningina víðari til virkið at gjalda.

Hetta er ólógligt. Talan er um svik og tí revsivert.

Í Dimmu sigur Heðin D. Poulsen: "Poul Michelsen hevur sitið so leingi á tingi, at hann fyri langt síðan átti at tikið stig til at ein lóg var samtykt, sum tryggjaði opinleika um, hvør fíggjar privata valstríðið."

Her ruggar ikki rætt. Eg veit at ongin annar enn eg sjálvur gjaldi fyri mítt valstríð. Eg veit heldur onki um, at nakað annað valevni – hvørki virkiseigarar, privat ella alment lønt - fáa onkran annan at gjalda fyri seg, og kenni eg heldur onki til at nakað virkið gjaldir pening til ávís valevni.

Tí havi eg av góðum grundum ongantíð sæð tørvin á nakrari lóggávu her.

MEN tað kann undra meg at Heðin D. Poulsen, sum veit alt um hetta óreglusemi, ikki reagerar fyrr enn nú. Við útvarpið veit Heðin at siga, at hann umvegis arbeiði sítt í politikki er komin framá hetta fyribrigdi.

Heðin hevur sitið í floksleiðslu Fólkafloksins og á tingið fyri flokkin, og hevur haft ríkiligt av tíð og møguleikum at steðga hesum "sokallaða" óreglusemi.

Eg havi alment biðið um, at Heðin og Annita leggja fram okkurt, sum kann undirbyggja skuldsetingarnar. Undirbyggja tað so mikið, at alt ikki bara hongur í leysari luft til skaða fyri tey virkiseigandi valevnini og til skaða fyri alt privat virksemi. Eg haldi, at tað er dýrur prísur, vit skulu gjalda fyri valstríði hjá Annitu og Heðin D. Poulsen.

# Fiskurin er ogn Føroya Fólks



HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Ein nýggjur fiskidagamarknaður skal hava sum endamál at umsita og umseta tilfeingi føroyinga.

Undan seinasta løgtingsvali boðaði Javnaðarflokkurin frá, at fiskidagar og fiskirættindi eiga at verða umsitin og umsett í einari skipan, sum øll vinnufús hava atgongd til, sum tryggjar, at ein ávísur tilfeingiságóði kemur øllum føroyingum til góða, og sum tryggjar, at kostnaðurin av at fara undir vinnu gerst ódýrari.

**Hetta er framvegis eitt høvuðssjónarmið**

Javnaðarfloksins, og sum eg fari at virka fyri, verði eg vald í Løgtingið.

Við at stovnseta ein Fiskidagamarknað, kunnu vit tryggja opinleika og dynamikk í vinnuni, umframt at vit kunnu útvega samfelagnum eitt størri búskaparligt avkast. Tryggja, at náttúruskapta ríkidømið verður umsitið sum ogn Føroya Fólks, samstundis sum handilsligar og vinnuligar treytir verða galdandi. Á henda hátt ber eisini til at fyribyrgja, at peningalig spekulatión kemur í fiskirættindini.

Finnast má sjálvsagt fram til eina hóskandi umskiftisfarleið, soleiðis at fólk, ið hava handlað í góðari trúgv og út frá galdandi lóggávu, ikki verða verri stillað.

Í Sosialinum í dag ber til at lesa, at tað var um reppið, at Javnaðarflokkurin tók undir við einum lógaruppskoti, sum hevði givið nøkrum ávísum borgarum óuppsigiligan rætt til alt fiskiríkidømið undir Føroyum. Tíbetur eydnaðist tað Javnaðarflokkinum at steðga hesari lógarbroyting á málstrikuni.

Men tað hevur í farna valskeiði ikki eydnast at fáa semju millum samgonguflokkarnar um eina skipan, ið tryggjar, at fiskiríkidømið verður umsitið sum ogn Føroya fólks.

**Onkur skal fíggja millumrokningina**

At eisini tey, sum starvast í vinnuni, eru farin at kenna sviðan av órættvísu skipanini, kom fram, tá ið Skipara- og Navigatørfelagið herfyri alment boðaði frá, at manningafeløgini ikki longur kunnu liva við, at fiskirættindi og fiskidagar verða keypt og seld fyri so ovurhonds stórar upphæddir. Onkur skal fíggja hesa millumrokning.

Tað verða manningarnar, sum í seinasta enda koma at rinda fyri, at rættindi til at fiska verða so himmalrópandi dýr. Í løtuni er flotin verkfalsraktur allur sum hann er. Ein av orsøkunum er, at reiðaríini vilja hava manningarnar at rinda ein part av øktu rakstrarútreiðslunum, í hesum føri fyri oljuútreiðslur. Men hvat verður tað næsta – og er tað kanska í veruleikanum orsakað av dýru fiskirættindunum, at oljan virkar sum steinur oman á byrðu?

Vinnupolitiskt er avgerandi at fáa loyst hetta mál.